Skúlin á Ziskatrøð
Postboks 53 · FO-700 Klaksvík

# Lærarastørv í Skúlanum á Ziskatrøð

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2007:**

- 4 lærarar í fast starv.
- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 fyri lærarar í farloyvi.
- 1 lærari í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 at lesa avlopstímar.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og er fyrikomandi
- eru nærlagdir og stundisligir.

**Lærararnir skulu hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum:**
- føroyskt, søgu/samtíð, tónleik, støddfrøði, enskt, týskt og danskt.

**Førleikakrøv:** Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar- og setanartreytir:** Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í Lønarflokkunum 18.1- 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mikudagin 20. juni klokkan 12.

Í skúlanum á Ziskatrøð verða komandi skúlaár umleið 380 næmingar frá 1. – 10. flokk.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Skúlan á Ziskatrøð telf. 455025 (skúlastjórin), 444386 (Signar á Brúnni, skúlastjóri) ella telf. 443192 ( Ólav Sjúrðarberg, varðaskúlastjóri).



# Bilur til sølu

Toyota Corolla 2.0 diesel frá juni '98. Koyrt 278.000 km. Vetrar- og summardekk.

Til sølu fyri hægstbjóðandi.

**Tel 55 15 24**

# Pedagogur

Í Barnagarðinum á Teiginum heima á Sandi sóknast vit eftir einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna í "Miðlon". Børnini í Miðlon eru 2 – 4 ára gomul.

Talan er um eitt barnsburðarfarloyvisstarv í ½ ár.

**Krøvini til tín eru:**
- at tú er fyrikomandi og erlig/ur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar
- at tú heldur arbeiði við 2 – 4 ára gomlum børnum vera spennandi og avbjóðandi
- at tær dámar at verða úti í øllum veðrið
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- at tú er nærverandi og dugir at lurta
- at tú vil verða við til at menna barnagarðin og tað arbeiði vit hava sett okkum fyri

Starvi verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Tú fært nærri upplýsingar um starvið, um tú vendir tær til Lailu Marston Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/212751.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum, skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, Koytugøta 1, 210 Sandur. Umsóknarfreistin er úti 22.06.07. Starvið verður sett 01.07.07. Allir umsøkjarar fáa svar.

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**

# Starvsfólk til matarhøll tingsins

Søkt verður eftir einum fólki til matarhøllina í Løgtinginum.

Tann, ið settur verður, skal vera røkin, álítandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur at hava útbúgving og/ella royndir frá líknandi arbeiði.

Arbeiðstíðin verður einar 600-700 tímar árliga, soleiðis at skilja, at matarhøllin er opin, tá tingfundir eru. Talið á tingdøgum er umleið 100 dagar um árið, vanliga í tíðarskeiðnum frá ólavsøku til umleið 15. mai.

Talan er um nýtt virksemi, og verða tí fyrstu 6 mánaðirnir at rokna sum ein royndartíð, har tann, sum sett/ur verður, í samstarvi við leiðsluna leggur tilrættis, hvussu arbeiðið skal skipast.

Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsøkjarar eru vælkomnir at ringja til Súsonnu Danielsen, stjóra, tlf. 363900 fyri at hoyra nærri um starvið.

Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til: Løgtingið, Postrúm 208, 110 Tórshavn, og skulu vera Løgtinginum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2007.

# Gøtu skúli

við Gjónna 4 · Postrúm 24 · 511 Gøtugjógv
Tlf. 441059 / 771019 · Fax 441595
skurin@post.olivant.fo · www.skulin.fo/got

# Størv í Gøtu skúla

**lýst leys til setanar frá 1. august 2007 at rokna:**
- 2 føst fulltíðar lærarastørv.
- 1 tíðaravmarkað lærarastarv við uml. 27 undirvísingartímum um vikuna fyri skúlaárið 2007/08 vegna tímar til serligan tørv og avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett í september 2007.
- 1 starv sum stuðulsfólk 20 tímar um vikuna fyri skúlaárið 2007/08 til næmingar við serligum tørvi.

**Í Gøtu skúla leggja vit serligan dent á:**
- at trivnaðurin er í hásæti
- at tolsemi eyðkennir skúlan
- at næmingarnir mennast og gerast sjálvstøðugir
- at kveikja og menna hugflogið

**Tey, ið sett verða, skulu umframt at vera við til at fremja omanfyristandandi eisini:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans taka lut í dagliga virksemi skúlans
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fús at taka við uppgávum, avbjóðingum og broytingum, sum kunnu menna og skapa virðing fyri skúlanum
- Seta ein heiður í at vera stundislig og nærløgd

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a.:**
- kunnu undirvísa í dreingjaítrótti/svimjing
- hava innlit í KT
- kunnu undirvísa í enskum
- kunnu undirvísa í smíði

Ein fyrimunur er, at umsøkjarar hava starvsroyndir.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða í lærarastørvini, skulu hava læraraútbúgving. Lærarалesandi, sum lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
**Lærarastørvini** verða sett sum sáttmálasett størv og verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. **Stuðulsstarvið** verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi 20. juni kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Karl A. Thomsen, skúlaleiðara, í Tungu 7, 513 Syðrugøtu, tlf. 441059 ella 771019.

Í Gøtu skúla fara at ganga uml. 125 næmingar í 8 flokkum komandi skúlaár. Við skúlan fara at starvast 13 starvsfólk. Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/got

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!